# Tømdur løgmanssessur

JOHAN DAHL
løgtingsmaður, Vágur



**- og 200 milliónir í eykaskatti til palleba orsakað av óneyðugum yvirtøkum.**

Ein javnaðarflokkur, sum er skrædnaður í límingini – heldur politiska útsølu í CHE samgonguni.

Eg havi upp í saman gjørt javnaðarveljarum greitt, at tann flokkur tey hava hildið verið ein sambands/javnaðarflokk als ikki er tað, - hann var tað kanska einaferð, men ikki longur.

At flokkurin nú er yvirtikin av fullveldisfólki er sjón fyri søgn. Har er ongin samríkissinnaður tinglimur eftir, jú kanska ein vilstur Gerhard.

Tey lyfti sum Javnaðarflokkurin gav javnaðarveljarum og restini av føroyingum í valstríðnum við skrivi í hvørt hús beint undan valinum, var, at ongin blokkniðurskurður skuldi fremjast, tí nú var tað vælferðin og bleyt virði sum skuldu í hásætið.

At flokkurin so er drigin eftir oyrunum og hevur hildið útsølu til samráðingarnar við H & E má verða beiskt at slúka. Tjóðveldi kann vera væl nøgt, teir hava fingið alt teir hava peikað á.

**Løgmaður samráddist uttan vilja til skilagóðar loysnir**

Hvat ger man ikki fyri ein løgmanssess og eina loysingarsamgongu??

Jú man samráðist ½ tíð (frá 10-10.30 til ca. 17) við teir flokkar sum vístu einum álit og lótu løgman hava samráðingarrættin, og so í "nattens mulm og mørke" leggur man samgonguætlanir við øðrum flokkum, - sera framtíðar álitisvekjandi má sigast.

**Beinleiðis rokning upp á 200 mill til føroyska skattgjaldaran**

Nú hevur Jóannes Eidesgaard selt út av løgmansembætinum – hann vil jú sita sum løgmaður fyri einhvønn prís og kostnaðurin er:

Eitt úttømt løgmansembæti og 200 milliónir í yvirtøkum.

Uttanríkismálini og menningarhjálpina o. a. undir ráðnum, hevur hann latið fult og heilt upp í hendurnar á Høgna Hoydal.

Man selur síðan rætt og slætt sína politisku sál, - fyri umleið 200 milliónir í yvirtøkum og løgmansembætið.

**Sambandsflokkurin vildi hava ábyrgdarfullan fíggjar- og búskaparpolitikk førdan**

Vit (Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin), sum fyrst samráddust við Javnaðarflokkin, vildu heldur enn at tosa um at skerja blokkin, hvørt ár seta pening í ein vælferðar og sjálvbjargnisgrunn, - men tá vildi Javnaðarflokkurin ikki verða við, tí hetta skuldi kosta vælferð bleiv sagt!!

Vit í Sambandsflokkinum vildu hinvegin tryggja framtíðar vælferðina og pensjónir, við seta pening til síðis, alt meðan vit arbeiða við at fáa fleiri vinnulig inntøkubein at standa á fyri at røkka størri fíggjarligum sjálvbjargni, hetta við m.a. at gera eina ítøkiliga vakstrarstrategimen tað vildi føroyski socialdemokratiski Javnaðarflokkurin ikki, trúgv tí hvør ið vil.

**Minka vælferðina við 200 milliónum**

Nú velja teir ístaðin at minka um vælferðina hjá føroyingum við 200 milliónum hvørt ár eftir hetta 4 ára skeiðið, um teir sleppa at sita so leingi, - og koma harvið at leggja enn størri byrðar á føroyska skattgjaldaran.

Ein skal hava í hugað at útyvir hesar 200 milliónirnar sum verða skerdar (minni fruminntøka pr. ár), so skulu vælferðarátøk innan skúlar, skúlabyggingar, útbúgving, heilsuverk, almannaverk og sosialmál fremjast fyri milliardir, so kravið til inntøkur til landskassan er metstórt, vit hava snøgt sagt brúk fyri hvørjari krónu.

Løgmaður skyldar okkum at greiða frá, hvar hann ætlar at finna fígging fyri CHE ætlanunum og hvussu hann kann skerja blokkin við 200 milliónum, men ikki hevði ráð saman við A & B at seta millum 80 og 150 mill kr. um árið ístaðin í ein vælferðar og sjálvbjargnisgrunn? Teir pengarnir blíva ikki burtur, men standa á konto í Landsbankanum.

**Floskulkent og lítið ítøkiligt samgonguskjal uttan serligan substans**

Hyggur tú í samgonguskjalið, so er truplut at fáa eyga á hvussu komast skal til størri inntøkur fyri landið, - annað enn uppaftur meira skatt á vinnu og privatfólk við hampuligari inntøku, kapitalvinningsskattin, (kanska ognarskatt hvør veit, hóast ikki beinleiðis nevnt ?) .

Teir ætla at skaffa betur marknaðaratøgongd gjøgnum tey 4 frælsini, men aftra seg hinvegin við at lata upp fyri útlendskari arbeiðsmegi? Hvar er logikkurin?

Teir tosa framvegis um EFTA, - sum er og verður "a dead duck" og so granskging sum tann "heilaga gralin" til allar framtíðar loysnir - sera sera visjónert má sigast.

Teir vilja hava alt teir kunnu fáa frá ES og gagnnýta hetta sambandsríkið fult út við sínum møguleikum, men vilja onki geva - alt vald til Føroyar siga teir á uttanríkispolitiska økinum. Í Føroyum skulu einans rættir føroyingar ráða, - sikken ein naivitetur má sigast.

Jú víst eru teir bæði visjónerir og altjóðagjørdir við slíkum dunnuhyljahugburði í 2008.

Teir hava ivaleyst við vilja gloymt verandi truplu støðuna hjá skipaflota okkara og virkjunum á landið, sum fleiri eru í trupulleikum fíggjarliga.

Teir hava heldur ikki lagt sær í geyma at oljuprísurin væntandi verður 150 dollarar fyri tunnuna í nærmastu framtíð og at fiskiflotin tá er í enn størri trupulleikum enn í dag, - hvørjar loysnir hava teir uppá hesar trupulleikar?

Retoriskt vælvaldu flosklarnir í hesum samgonguskjalinum eru lítið nýtiligir tá á stendur, tað fáa allir føroyingar at síggja.

Vælferðin er ikki komin av sær sjálvari – hon er komin í einum góðum ríkisfelagsskapi við okkara virðismiklu arbeiðsmegi á sjógvi og landi, gloymið ikki tað tit loysingarfólk.

Hasin løgmanssessurin bleiv Føroya fólkið kostnaðarmikil og innanholaður at enda.

# TÍÐARPRINSAR

jøtunkranar
sunnan fyri Elbtunnel í Hamburg við
gulum grindalokka-beinum og
gløðandi marsmanna-høvdum

soskaptir lakka okkara
innovativu metroseksuellu
tíðarprinsar

andlitsleys egghøvd við
Brecht-stapum og ossetiskum
kakulakk-mustasjum og við "konseptum"
og "synergieffektum" og "branding" og "boom"

sum fleyra móti bleikum vestalinnum
sveipt í veikan ammoniak-ráka
eins og guva úr rotnum jakslum

eftir skúla banka aðalráða forstjóra
meginnevnda lystiligu løgarsteinum

fruktum sum falla á ásettum tíma
úr snykutum fingrum
sum
útblástir eggjakoppar

*So I turned into a sty*
*And laid me down among the swine*

**Hanus Kamban**

# Tá tjóðarsemjur skulu skapast

HEIDI PETERSEN



Skal tað eydnast at gera avtaluna í samgonguskjalinum til veruleika og veruliga skapa tjóðarsemju um tilfeingispolitikkin, fiskivinnupolitikkin, krevst politiskur stabilitetur, álit á skipanina og at einstaklingar, feløg og stovnar hava álit á leiðini ætlanin er at ganga.

Tjóðarsemjan, sum skal byggja á yvirordnaða prinsippið um, at tilfeingið er ogn Føroya fólks, tryggjar at sølur av loyvum og døgum fara fram yvir ein almennan fiskidaga- og loyvisbanka, eina tilfeingisbúð, at rætturin til tilfeingi verður varðveittur á føroyskum hondum, og at føroyska fiskiveiðan fer fram á burðardyggum grundarlag og harvið fær altjóða góðkenning.

Stóra politiska takið verður at skapa álit millum partarnar sum skulu gjøgnumføra tjóðarsemjuna. Tað verður Føroya Løgting sum hevur endaligu avgerðina, men tað verður landsins leiðsla sum skal slóða fyri lyftunum í samgonguskjalinum.

Hvussu hetta arbeiðið verður sett í verk, kemur at hava avgerandi týdning fyri endaliga úrslitið.

Tað krevst eitt opið sinni, eitt óendaligt tol og stór diplomatisk evni at gjøgnumføra hesa verkætlan.

Bert tíðin kemur at vísa um sitandi samgonga megnar hesa uppgávu.




Tíðargreinin

# … Biddari ella borgari

vanligu mannarættindayvirlýsingunum? Svarið er avgjørt eitt ja. Formliga eiga tey at vera tryggjað, men veruleikin er ein annar. Vit kunnu tí heldur venda spurninginum við: Um tey við breki eru tryggjað í galdandi mannarættindayvirlýsingum – og hetta sæst aftur í heimligu løggávuni – so kostar tað onki at vísa umheiminum, at vit ynskja at hava okkara viðurskifti í lagi! Skuldi tað hinvegin víst seg, at onkur lóg er, ið ikki gevur teimum við breki somu rættindi sum øðrum, so er tíð uppá at gera nakað við hetta. Tá er hetta eitt kærkomið høvi at gera neyðugu broytingarnar.

**Eisini í Føroyum**

So kann onkur siga, at her hjá okkum er støðan hampiliga góð – tað er verri í øðrum heimspørtum. Tað er púra rætt! Tað er verri í øðrum heimspørtum, tíverri. Men sáttmálin leggur ikki upp til, at støðan skal vera eins í øllum heiminum – tað er órealistiskt – men at hvørt land tryggjar, at tey við breki fáa *somu* rættindi sum aðrir borgarar í sama landi! Og tað er ikki órealistiskt. Tvørturímóti halda flestu okkara helst, at tað er sjálvsagt. Tað merkir eisini, at so hvørt sum livikor sum heild batna í einum landi, eigur samfelagið at taka neyðug stig til, at eisini tey við breki fáa lut í hesi framgongd.

Sum nevnt hevur løgmaður boðað frá, at nevnd er sett at fyrireika hetta arbeiði, so sáttmálin kann setast í gildi í Føroyum. So er at vóna, at nýggja landsstýrið fylgir hesum upp og ger sítt ítasta fyri at gjøgnumganga alla løggávu, so vit vita, hvørjar broytingar eru neyðugar fyri at seta sáttmálan í gildi. Tí hesin sáttmálin hevur alstóran týdning fyri at bøta um støðuna hjá fólki við breki, so tey ikki longur eru biddarar, men borgarar.

Klára vit sum samfelag ikki tað, er tað samstundis ein ásannan av, at vit heldur ikki liva upp til gomlu ST-yvirlýsingina um mannarættindi frá 1948. Og enn verri: so ætla vit okkum tað heldur ikki. Men kann eitt Norðurland anno 2008 bjóða sínum borgarum tað?